# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Timeout í tunnilsmáli

Hóast vit tosa um ómetaliga høg tøl tann skeiva vegin í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 20010, so er tað orðingin hjá fíggjarmálaráðharranum, "Timeout í tunnilsmálinum", sum hevur sett dagsskránna í miðlunum higartil. Sosialurin vistu í farnu viku at siga, at hvørki Sandoyartunnil ella tunlar Norð um Fjall fóru at síggjast í fíggjarlógaruppskotinum, og hetta elvdi alt fyri eitt til hvassar viðmerkingar frá samgongufólkum, her ikki minst frá máttmikla formanninum í Fíggjarnevndini, Anfinni Kallsberg.

Nú uppskotið er lagt fram verða hesi tíðindi váttað. Og fíggjarmálaráðharrin er púra avkláraður og sigur uttan himpr, at tað er "timeout í tunnilsmálinum." Eftir øllum at døma hevur hann undirtøku fyri hesum í landssstýrinum, eisini hjá formanni Fólkafloksins.

Hóast tunlarnir ikki eru partur av fíggjarlógaruppskotinum og tí ikki áttu at fingið høvuðsfokus, so skerst ikki burtur, at júst teir kunnu koma at seta kílar djúpt inn í samgonguna fyri ikki at siga koppa henni. Vit minnast, at tað á sinni skuldi ikki meira til enn ein almenn farleið til Aberdeen fyri at fella eina samgongu. So hvat tvær so týðandi tunnilsætlanir kunnu gera er nakað vit bara kunnu gita okkum til.

Tveir av sterku monnunum í Fólkaflokkinum, formaðurin í tingbólkinum og fíggjarnevndarformaðurin hava longu gjørt greitt, at teir góðtaka ikki hetta inntrivið frá fíggjarmálaráðharranum og (les teirra egna formanni, Jørgen Niclassen), at eingir pengar verða settir av til tunnilsgerðirnar. Vit taka sum givið, at Jóannes Eidesgaard hevur hinar flokkararnar í landsstýrinum aftanfyri seg, tá fíggjarlógaruppskot verður lagt fyri tingið. Og hvat enn tingmenn sig, so er Jóannes Eidesgaard ikki til at vika. Tað eru tey, sum halda, at "gamli" Jóannes Eidesgaard er aftur traðkaður veruliga í karrakter. Nú kennir man hann aftur, tá hann er bestur. Avgjørdur og greiður í síni niðurstøðu, nevniliga, hvussu kunnu vit skerja í vælferðartænastum og samtíðis seta pengar av til ovurdýrar tunnilsætlanir! Greið tala. Hesum sjónarmiðjum man formaður Javnaðarfloksins hava holla undirtøku fyri kring alt landið og í øllum aldursbólkum. Ikki minst millum landsins 9000 pensionistar.

Orsøkin til at vit taka tunlarnar fram, nú fíggjarlógaruppskot er lagt fram, er tann, at vit meta, at júst hetta málið fer at verða raðfest høgt í kjakinum komandi tíðina. Entá kunna vera tað, sum fær bikarið at flóta yvir og føra til samgonguslit.

Fíggjarlógin hevur eitt hall uppá 767 mill. kr. Mong siga, at hetta eiga vit at kunna liva við í nøkur fá ár. Tað metti m.a. andstøðutingmaðurin Tórbjørn Jacobsen í kjakinum á Rás2 í gjár. Men legði so dent á, at síðani máttu vit fáa javnvág. Og hansara viðmerking var eisini, at tað sermerkir hesa samgongu, at kassaapparatið stendur opið og eingin hugsar um øktar inntøkur. Júst hetta fer helst at verða ein reyður tráður í kjakinum. Ein spurningur, sum átti at verið umrøddur um sama mundið, er, hvat hetta og undanfarin landsstýri hava gjørt fyri at finna inntøkur at koma ístaðin fyri sleptu blokkinntøkurnar.

**Sosialurin**

## Takið høvdið undan arminum aftur!

**HERGEIR NIELSEN**



Afturvendandi hóvástákið um at gera tey frægastu samferðslusambondini enn betri, er nú aftur í hæddini.

Tosað verður ikki í mió., men í mia.kr. stórum íløgum til 2. og 3. generaratións samferðslukervi til útvald miðstaðarøki í landinum.

Framburður og framstig eru loysunnarorðini fyri hesi øki. Onnur øki sleppa at liva sítt egna lív í friði og náðum, meðan eitt øki er, sum er fyri beinleiðis ágangi.

Um Suðuroyarfjørð verður ikki tosað um framstig ella framburð. Nei, her søkja tey at tí vánaligasta sambandinum í landinum og ætla at gera tað verri, enn tað er.

Meðan stríðst verður við at gera gott , har gott er, skal Suðuroyggin niður við nakkanum, kosta hvat kosta vil.

Undan løgtingsvalinum góvu allir flokkar lyftið um at fremja Suðuroyarætlanina. Hon kom sjálvandi við í CHE-samgonguskjalið, men síðani var hon slept.

Ikki eitt einasta vega- ella tunnilsstrekkið er sett út í korti í Suðuroynni av 6 ára gomlu ABC-samgonguni.

Ikki so frægt sum ein króna er játtað til verju, har havið etur burturav bygdaløgunum, eitt nú í Fámjin og Sumba.

Samstundis sum sjálvtøkur til byggitilfar verða settar upp, eitt nú í Hundsarábotni, har einki grót er eftir, verður grótbrotið í Porkeri, har tað besta gróti liggur, latið aftur, og allir mans sendir til hús.

Byggitilfar fæst ikki longur í Suðuroynni, og samstundis sum tað arbeiðandi fólki í Suðuroy varð sent til hús, varð lýst eftir fjølmiðlafólki til eina heila tíðindadeild í Havn á hesum stovni.

Sum skilst, so er landsstýrið komið til sættis um, at Suðuroyggin og suðuroyingar burturúr øllum føroyingum skulu hava ein yvir nakkan, kosta hvat, íð kosta vil, samstundis sum øll verðsins "finn upp á" størv verða skipað í Havn.

Farið varð til val upp á, at gera tað betri, men nú verða ítøkilig stig tikin til at gera tað verri.

Lyftini um at fjálga um og gera tað liviligari í útjaðaranum eru horvin.

Bygdamenning er strikað úr politiska orðaskiftinum, og teir veikastu samfelagsbólkarnir og tey veikastu samfelagsøkini eru nú offur fyri álopsryðjum av higartil ókendum slagi.

Fyri at bøta um undirstøðukervið tóku vit stig til at dagføra Suðuroyarleiðina fyri tíggju árum síðan. Nú er vent í holuni.

Samstundis, sum oljuprísurin er ávegis niður á 30 dollarar tunnuna, verður boðað frá, at Smyril verður lagdur stillur stóran part av samdøgurðinum.

Samstundis sum oljan fer í botn, fer Smyrlasiglingin sama veg.

Skerdir flutningsmøguleikar eru ein drepandi mønustingurin fyri tey virki, sum enn royna at hóra undan her í útjaðaranum.

Í somu løtu tey fyrstu leysatíðindini bórust um at æðraláta Suðuroyarleiðina, lat Fiskavirking í Vági aftur.

Einki fiskaarbeiði hevur verið á Fiskavirking í Vági nú í samfullar fimm vikur.

Samstundis sum milliardaupphæddir skulu brúkast til at gera tey góðu sambondini enn betri, fara tey nú inn á fíggjarlógina við greiðum boðum um, at tað skal ikki loysa seg at búgva og virka í Suðuroynni.

Tað tykist ikki nerva nakran, at ein heil familja flytir úr oynni um mánaðan.

Hóast kapasiteturin er ov lítil sum er, og 20, 30 og fleiri bilar javnan noyðast heimaftur av Busatanga, tí báturin er ov lítil, og túrarnir ov fáir túrar, so skal skerdi kapasiteturin skerjast enn meira.

Suðuroyarlandsstýrisfólkini halda nú, at ráð eru ikki til at halda landsvegin til Suðuroyar opnan, og ætla sær nú at steingja hendan eina vegin meginpartin av samdøgurðinum.

Kostprísurin umborð er longu hækkaður við eini 30%, og aðrar príshækkingar - á ferðaseðlum og farmi - eru ávegis.

Boðskapurin er greiður. Tað skal við vold og makt gerast verri, dýrari og torførari at búgva í Suðuroynni, samstundis sum tað skal gerast betri, bíligari og høgligari at búgva í miðstaðarøkinum.

Vit kenna aftur hesa ørkisleysu jagstranina eftir pensjonistum og veikum samfelagsbólkum, nú farið verður eftir stórsta og veikasta útjaðaranum.

Vikutúratalið við Smyrli liggur niðanfyri dagliga túratali á øðrum leiðum, men kortini er tað hesum eina fárinum hjá tí fátæka, ið farið verður eftir.

Hetta ljóðar alt sum ein óndur dreymur, men so er ikki.

Vælsignaða samgonga! Takið høvdið undan arminum aftur, og latið vera við at bróta niður, har bygt er upp, og nøkunlunda liviligt er !

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.